# Hótti við at taka lívið av sær

**Ein 57 ára gamal maður í Havn hótti týskvøldið við at taka seg sjálvan og konu sína av døgum. Løgreglan megnaði tó at handtaka mannin, áðrenn nakað hendi**

HÓTTAN
*Stefan í Skorini*

Týskvøldið klokkan tíggju minuttir yvir seks fekk løgreglan í Havn eina uppringing frá einum 57 ára gomlum manni, sum var frá sær sjálvum.

Hann hótti við at taka lívið av sær sjálvum og konu síni. Orsøkin var, at hann var leiddur við lívið. Politisturin bjóðaði sær til at koma út at tosa við hann, men so skuldi løgreglan fáa somu viðferð, segði maðurin.

Nummarvísarin á politistøðini gav avvarðandi politisti eina hilling á, hvar maðurin helt til. Politistar fóru síðani til húsini, haðani maðurin ringdi, meðan vakthavandi á støðini ringdi mannin uppaftur.

Hann royndi sum frægast at tosa við mannin, so at hann ikki varnaðist, at politiið var á veg. Tá politistarnir komu inn í húsini, tosaði maðurin í telefon, og hann varð handtikin beinanvegin.

Maðurin hevði ikki skotvápn í hondini, men tað lá aðrastaðni í húsinum. Maðurin var ávirkaður av rúsdrekka, tá tilburðurin fór fram.

# Trý tikin í ferðmáting

FERÐSLUKANNING
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Runavík gjørdi týskvøldið ferðmátingar í Søldarfirði. Kanningin vardi í ein tíma, og tíggju frágreiðingar vórðu skrivaðar.

Tríggir bilførarar koyrdu meira enn 80 kilometrar um tíman og skulu helst taka koyrikortið umaftur, umframt at teir fáa ein treytaðan dóm.

# Koyrdi á bil við fólki

**Ein 40 ára gamal maður á Eiði varð í gjár handtikin fyri at hava koyrt á ein bil við fólki við vilja**

HANDTØKA
*Stefan í Skorini*

Í gjárkvøldið umleið klokkan ellivu fekk løgreglan í Runavík fráboðan um ein tilburð á Eiði. Kona og maður komu heim til húsa í bili og parkeraðu uttanfyri húsini. Ein fullur maður sat í einum lítlum jeepi uttanfyri húsini.

Hann ger ikki mætari enn at bakka á bilin við fólkunum tvær ferðir. Parið boðar løgregluni frá beinanvegin. Kvinnan í bilinum var við barn, og hesum visti maðurin av.

Tá løgreglan kemur á staðið, er maðurin rýmdur av staðnum, men hann verður funnin aftur niðri í bygdini.

**Til Havnar**

Maðurin var fyrst tikin við á støðina í Runavík og síðani fluttur í klivan í Havn. Hann var ávirkaður av rúsdrekka, tá tilburðurin fór fram.

Maðurin hevði einki koyrikort, og akfarið, sum hann koyrdi í, var heldur ikki skrásett, tí bilurin hevði ongar plátur.

Maðurin verður væntandi skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring, fyri at koyra uttan koyrikort og fyri at hava koyrt í einum óskrásettum akfari. Maðurin verður helst eisini ákærdur fyri at hava koyrt á ein bil við tveimum fólkum við vilja.

# Ungdómar til Svøríki at spæla sjónleik



*Teir tólv sjónleikararnir fara at framføra leikin um Speedy Gonzales á sjónleikarastevnu í Svøríki*

**Tann 1. august fara tólv ungir sjónleikarar, sum dagliga venja í Dramaverkstaðnum, til Svøríki at luttaka á eini sjónleikarastevnu. Tey fara at framføra leikin »Speedy Gonzales setur ferð á«**

SJÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Í dag fara tólv ungdómar av landinum at royna síni evni sum sjónleikarar. Tað er Dramaverkstaðið hjá Hjørdis Johansen í Havn, sum fer til Svøríki í eina viku, har tey skulu framføra ein leik.

Føroysku sjónleikararnir skulu vera við á eini norðurlendskari sjónleikarastevnu, sum verður í døgunum frá 1. til 7. august í svenska býnum Västerås.

Á stevnuni verða sjónleikarabólkar úr øllum teimum norðurlendsku og baltisku londunum, og tað eru bæði vaksin og ung, sum fara at framføra leikir á hesi stevnuni.

**Speedy Gonzales aftur á skránni**

Á stevnuni fara sjónleikararnir at framføra leikin »Speedy Gonzales setur ferð á«. Leikurin er leysliga umsettur úr donskum av Hjørdis Johansen. Síðani hava sjónleikararnir og leikstjórin improviserað, áðrenn tann endaligi leikurin hevur verið klárur.

Leikbólkurin hevur fleiri ferðir áður framført henda leikin á palli á Meiarínum í Havn. Tað var í juni mánað í fjør, at ungdómsbólkurin framførdi henda leikin.

Leikurin snýr seg um misnýtslu av narkotika, og um hvussu tey ungu fólkini sjálvi royna at sleppa burturúr hesum haftinum.

Persónarnir í leikinum siga frá sínari lívssøgu, og tað verður víst í flashback, hvussu lív teirra vóru, áðrenn tey hittust og blivu vinir. Leikurin varar ein góðan tíma.

Býráðið, Sansir, Mentanargrunnur Landsins, Føroya Sparikassi, MáF, Mentamálráðið og Nar hava stuðlað ferðini.

**Leikarar:**

| | |
|---|---|
| Sofía Nolsøe Mikkelsen: | Speedy Gonzales |
| Heidi Borum Hansson: | Pisa |
| Rannvá Simonsen: | Julia |
| Aleksandra Neshamar: | Tornurósa |
| Sjúrður Simonsen: | Soldátur |
| Martin Andreas Kruse: | Hamlet |
| Marin Djurhuus: | Snjóhvíta |
| Rannvá undir Kletti: | 7 skiftandi leiklutir |
| Sára Finsdóttir: | 7 skiftandi leiklutir |
| Absalon Lydersen Jacobsen: | 8 skiftandi leiklutir |
| Birna Heinesen: | 7 skiftandi leiklutir |
| Durita Dahl Andreasen: | 7 skiftandi leiklutir |
| **Leikstjóri:** | Hjørdis Johansen |
| **Tónleikur/ljóðmyndir:** | Sára Finsdóttir og Marin Djurhuus |
| **Búnar:** | Hjørdis Johansen og Leikarafelagið |
| **Pallmynd:** | Hjørdis Johansen og Brynjolfur av Heygum |
| **Ljóð:** | Christian Kruse |
| **Ljós:** | Turpin Djurhuus |

Sosialurin Sosialurin i



Løgmaður ringdi til Høgna Hoydal eftir Dag og Viku:

# – Samdir um tulking av brævi

SAMGONGUMÁL
*Jan Müller*

Anfinn Kallsberg løgmaður er fullkomiliga ósamdur við Tórbjørn Jacobsen, tá hesin í sjónvarpinum týskvøldið sáar iva um, hvussu bræv hansara til sín skal tulkast. Í sjónvarpinum týskvøldið segði Tórbjørn Jacobsen, at tað hann hevur tikið aftur í brævinum til løgmann er bara ein partur av teimum skuldsetingunum hann setti fram móti løgmanni í bløðunum 7. juli.

Tórbjørn Jacobsen segði í samrøðu í Degi og Viku, at tað hann hevði fingið at vitað skuldi vera trupulleikin, var setningurin hann skrivaði um, at løgmaður kundi ikki verið leiðari í nøkrum øðrum landi. Og tá hann tískil hevur tikið tað orðingina aftur, stendur sjálvandi restin eftir.

Uppá fyrispurning um hann kortini meinar, at løgmaður kundi sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi svaraði Tórbjørn Jacobsen m.a.:

- Nú er tað so, at hasin setningurin er rættiliga yvirflødigur, tí ein føroyingar kann neyvan blíva stjórnarleiðari í nøkrum øðrum landi.

Sambart úttalilsunum hjá tingmanninum í sjónvarpinum, so hevur Tórbjørn Jacobsen í skrivi sínum til løgmann ikki tikið aftur orðini um, at tað er ringt at liva við einum løgmanni og einum fiskimálaráðharra, sum í eini greindari fortíð ikki dugdu at skilja millum, hvat var eins egna og annara.

Anfinn Kallsberg vísir í viðmerking til hesi nýggju úttalilsini frá Tórbjørn Jacobsen til brævið hann fekk frá honum ólavsøkudag. – Tað er tað eg haldi meg til.

Brævið er soljóðandi:

"Til Anfinn Kallsberg, løgmann, her, dagfest 29. juli 2002. Hervið skal verða sagt frá, at skuldsetingarnar, sum eru settar fram móti løgmanni, løgmansembætinum og landsstýrismanninum í fiskimálum, hervið eru afturtiknar. Tórbjørn Jacobsen, løgmatingsmaður."

- Men nú sigur hann nú, at tað er bara tann seinna partin av skuldsetingunum hann tekur aftur?

- Tað er nakað forferdiligt slutur og tvætl. Hann ringdi til mín ólavsøkumorgun klokkan 10.30 minnist meg rætt, og har tosaðu vit aftur og fram. Tá segði eg við hann, at eg vildi hava eina treytaleysa afturtøku av øllum skuldsetingunum, sum hann hevði sett fram móti mær og fiskimálaráðharranum, og eg vildi ikki hava nakað uttanumtos.

Og so sendi hann eitt skriv, sum bara er uttanumtos. Eg havi ongantíð ringt til Tórbjørn Jacobsen og biðið um nakað sum helst. Men eg varð uppringdur nakað seinni av Høgna Hoydal, har hann fekk heilt greitt at vita, at tað, sum skuldi til fyri, at eg broytti støðu ( at leggja frá sær, blaðm) var, varð eitt skriv sum hetta. Og tað havi eg fingið.

- Er nú ikki skuldstingarnar settar fram av nýggjum?

- Tað veit eg ikki. Tað, sum eg havi kravt og fingið haldi eg meg til. Stendur hann ikki við tað hann skrivar, so veit eg ikki um hann ella eg havi ein trupulleika.

Løgmaður spyr, um nakað sum helst trúvirði er eftir í manninum eftir at hann hevur undirskrivað brævið og latið tað víðari, nú framhaldandi fer at leggja eina aðra tulking í tað.

-Men hvussu ber tað til, at Anfinn Kallsberg vil halda fram sum løgmaður í eini samgongu við Tórbjørn Jacobsen sum 17. manni eftir hetta?

- Tað er so aftur ein annar spurningur. Men eg havi valt at halda meg til tað brævið, sum Tórbjørn Jacobsen hevur skrivað og sum er so klokkuklárt og uttan uttanumtos. Um Tórbjørn Jacobsen í dag ikki stendur við tað hann undirskrivaði í gjár, so hevur hann eitt alvorligt problem.

Anfinn Kallsberg, sum sjálvur sá Tórbjørn Jacobsen í Degi og Viku týskvøldið, sigur, at tað inntrykkið, sum hann gav í hesi tíðindasendingini, vísir, at hann ikki so frægt sum stendur við sína egnu undirskrift. Tá hevur hann ein stóran trupulleika.



*Anfinn Kallsberg, løgmaður: -Nú eri eg kanska í so naivur. Eg trúði, at hetta málið var avgreitt við tí undirskrivaða brævi eg fekk, men sambart sjónvarpinum, so er okkurt, sum bendir á, at tað er ikki so*

Uppá fyrispurning um hetta fær nakra avleiðing fyri samgongusamstarvið sigur løgmaður, at tað skal man bíða við at siga nakað um.

Eftir úttalilsini í Degi og Viku týskvøldið ringdi løgmaður til formannin í Tjóðveldisflokkinum. – Høgni Hoydal er púra samdur við mær í míni tulking av brævinum frá Tórbjørn Jacobsen. Vit halda báðir, at skrivið frá tingmanninum er púra eintýðugt. Hann tekur allar skuldsetingar aftur.

- Tórbjørn Jacobsen er framvegis 17. maður í eini samgongu, sum bæði løgmaður og varaløgmaður vilja halda fram við. Hvussu ber tað til, at tit vilja halda fram við eini so smælari samgongu og har ein persónur, sum tit eftir øllum at døma hava so lítið álit á, framhaldandi sleppur at vera tungan á vágskálini?

- Eg havi ikki fleiri viðmerkingar til málið og kann bara endurtaka, at eg havi fingið eitt púra greitt svar frá Tórbirni Jacobsen, sum eg eri nøgdur við og sum uppfylti tey krøv eg setti fult og heilt. Um man nú roynir at draga í land og undirminera sína egnu undirskrift, so vísir tað bara, hvørjar politiska bindingar, man kann hava sínamillum.

Løgmaður leggur aftrat, at seinastu úttalilsini hjá tingmanninum frá sínum sjónarhorni eru fullkomiliga hol í høvdið og ógrundað og uttan nakað sum helst perspektiv av nøkrum slag.

- Men hví tá halda fram í fýra ár við einum flokki, sum ikki megnar at hava tamarhald á sínum egnu?

- Tann spurningin skilji eg sera væl. Verður hetta arbeiðslagið, so verða tað ikki vit, sum taka nakrar avgerðir. Tá verður tað tilvildin, sum tekur avgerðir, og tað er ikki tað, sum skal til, um vit skulu gera okkum vónir um at røkka tí politiska setningi vit hava sett okkum. Hinvegin vil eg siga, at skulu vit røkka einum politiskum setningi, og hetta er ikki bara meint millum Tjóðveldisflokkin og okkum, tað er galdandi fyri alt parlamentariska grundarlagið og fyri bæði samgongu og andstøðu, skulu vit røkka tey optimalu úrslitini fyri okkara land og fólk, so ræður um at kasta slíkt brigsl burtur og finna saman, sjálvt um vit eru politiskt ósamdir um nógv mál. Ber tað ikki til, so er eingin meining í at fáast við tað.

- Men er tíðin ikki longu komin til at taka stigið til at breiðka um parlamentariska grundarlagið, so tað slepst undan at vera bundin av einum 17. manni sum Tórbjørn Jacobsen?

- Tað kann blíva ógvuliga aktuelt.



*Eftir Dag og Viku týskvøldið ringdi løgmaður til formann Tjóðveldisfloksins. Sambart løgmanni vóru teir fullkomiliga samdir um, at brævið frá Tórbirni Jacobsen skuldi skiljast sum ein afturtøka av øllum skuldsetingunum.*